# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit vera vit savnaði í einum róligum umhvørvi uttan nakra kapping, so tað verður eitt sindur øðrvísi enn í sjálvum kappróðrarárinum*

*Jannie Dam Jacobsen um kappróðrargallaveitsluna*

# Gallakvøld hjá rógvarunum

**Í kvøld, fríggjakvøld, verður ársins gallaveitslu hjá føroysku kapprógvarunum hildin í B36-húsinum. Her skulu ársins áralag og ársins felag m.a. kjósast, samstundis sum ein Fair Play-prísur skal gevast**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Gallaveitslan hjá kappróðrarfólkunum verður í kvøld, fríggjakvøldið, og her fáa manningar og kappróðrarfeløg møguleika at vinna ymsar prísir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyri knøppum tveimum vikum síðani kom kappróðrarárið at enda, og tá blivu allir føroyameistararnir og ólavsøkuvinnararnir eisini funnir. Hetta var sostatt endin á hørðum arbeiði, sum hevur vart í fleiri mánaðir fyri flestu av rógvarunum.

Sjálvt um róðrarkappingarárið er komið at enda, so ætla rógvararnir tó at møtast einaferð afturat í ár. Í kvøld, fríggjakvøldið, verður árliga gallaveitslan nevniliga á skránni triðja árið á rað, og í ár verður hon hildin í B36-húsinum. Tað er Róðrarfelagið Knørrur, sum skipar fyri gallaveitsluni, og í hesum høpi vera eisini fleiri prísir latnir. Prísirnir, sum skulu latast eru fýra í tali. Teir eru ársins felag, ársins áralag, ársins kappróðrarsangur og Fair Play prísurin.

### Savna rógvararnar

Í sambandið við komandi gallaveitsluni hjá kappróðrarfólkunum hava vit tikið eitt prát við Jannie Dam Jacobsen, róðurskvinnu á Jarnbardi, sum eisini er ein av fyriskiparunum. Vit spurdu hana, hvat var endamálið við eini slíkari veitslu.

- Endamálið við hesi gallaveitsluni er fyrst og fremst at savna rógvararnar sum ein enda uppá kappróðrarárið. Á gallaveitsluni vera vit savnaði í einum róligum umhvørvi uttan nakra kapping, so tað verður eitt sindur øðrvísi enn í sjálvum kappróðrarárinum, men tað er ikki so galið.

Nógv gott verður eisini skránni hetta kvøldið, sigur Jannie.

- Umframt tær ymisku handanirnar, so verður nógv gott á skránni. Har verður fyrst eitt gott borðhald, og so verður eisini undirhald á skránni. At enda er so eisini dansur.

Leggjast kann afturat, at tað eru teir, sum hava vera dómarar úti á stevnunum, sum eisini døma um, hvat felag skal vera ársins kappróðrarfelag, hvør manning hevur havt ársins áralag, og hvør bátur skal vinna Fair Play prísin. Hvat viðvíkur ársins kappróðrarsangi, so vera tað ymsir tónleikarar, sum fara at døma um hetta.

# Newcastle-fjepparar savnast í felag

**Um vikuskiftið byrjar nýtt kappingarár í ensku Premier League, og undan kappingarbyrjan ætla fjepparar hjá Newcastle United at gera eitt føroyskt fjepparafelag**

FÓTBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Føroyskir fjepparar hjá Newcastle United ætla at gera eitt fjepparafelag undan kappingarbyrjan í morgin, leygardagin*

Sera nógvir føroyingar hava áhuga fyri fótbólti, og kanska serliga er tað enska Premier League, sum hevur ovurhonds stóran áhuga. Hetta hevur eisini borið við sær, at okkurt fjepparafelag er sett á stovn í Føroyum, og tað seinasta í hesi røðini er føroyska fjepparafelagið hjá Arsenal.

Nú er tó líkt til, at enn eitt fjepparafelag verður sett á stovn í Føroyum. Tað eru teir báðir Jóhann Lützen úr Klaksvík og Fróði Jacobsen úr Havn, sum hava tikið stig til átaki.

Jóhann Lützen sigur, at teir hava alla tíðina havt ætlanir um at seta fjepparafelagið á stovn undan kappingarbyrjan í ár, og tí skal hetta helst henda skjótast gjørligt, sigur hann.

Føroyska fjepparafelagið hjá Newcastle fer eisini at hava eina heimasíðu, sum er við at vera liðug. Henda heimasíðan verður at finna á www.newcastle.fo. Leggjast kann afturat, at felagið hevur ætlanir um at skipa fyri árligum túrum til St. James' Park at hyggja eftir fótbólti.

Newcastle byrjar nýggja kappingarárið í morgin, tá Sam Allardyce og hansara menn vitja hjá gamla felagnum hjá Allardyce, Bolton. Dysturin byrjar kl. 15.00, og verður hann vístur á Canal+Sport 2.

Tey, sum hava hug at verða við til fyrsta fundin hjá komandi Newcastle fjepparafelagnum, kunnu seta seg í samband við Jóhann Lützen á teldupost johlut@klaksvik.fo

# KÍ fekk javnleik

**Kvinnurnar hjá KÍ fingu javnleik í fyrsta dystinum í UEFA-bólkinum, tá tær møttu hollendska Den Haag**

FÓTBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Í gjár vóru fyrstu dystirnar á skránni í UEFA-bólkinum hjá kvinnum, har KÍ er eitt av liðunum, sum tekur lut. Liðini í bólkinum hjá KÍ spæla í ár sínar dystir í Føroyum, og í gjár vóru fyrstu tveir dystir á skránni á Svangaskarði.

Í fyrra dystinum møttust FC Honka úr Finnlandi og Valur úr Íslandi, og her eydnaðist íslendska liðnum at vinna dystin 2-1.

Seinni um dagin skuldi KÍ so í eldin ímóti Den Haag úr Hollandi, og tað gekst ikki so galið hjá KÍ. 10 minuttir undan steðginum megnaði Den Haag at leggja seg á odda, men nakað inn í seinna hálvleik javnaði Doris í Garði Joensen fyri KÍ, tá hon var hægst eftir hornaspark.

Stutt eftir útjavnandi málið hevði Rannvá Andreassen ein risa málmøguleika, tá hon úr fimm metrum royndi seg við skoti. Men tíverri fór skotið beint á málverjan hjá hollendska liðnum, og so var tann vandin av.

Síðstu løtuna royndi Den Haag at trýsta, og tær komu eisini fram til fleiri málmøguleikar, men ein sera væl leikandi Randi Wardum í KÍ-málinum syrgdi fyri, at Den Haag einki mál fekk afturat. Sostatt endaði dysturin 1-1, og KÍ hevur fingið sítt fyrsta stig í bólkinum.